## Hósdagur 6. juni

### SVF

7.20 HM í fótbólti: Danmark-Senegal
9.20 Steðgur
9.50 HM í fótbólti: Kamerun-Saudiarabia
12.00 HM í fótbólti: Týskland-Írland
13.45 Steðgur
18.30 Pocahontas 17:26
19.00 Borð um borð 3:7 e
20.00 Dagur og Vika
20.25 HM-fótbóltur
20.40 Sálin á ranguni 2:6 - donsk røð
21.10 Ally McBeal
21.55 Krimitímin: Undir illgruna III 2:2
23.40 HM2002 - dysturin í dag
1.25 Liðugt

### Eurosport

7.30 Sailing - Sailing World
8.00 Superbike - Superbike Mag
8.30 Mountain Bike - World Cup Houffalize Belgium
9.00 Tennis - Grand Slam Tournament French Open
10.00 Football - World Cup Road To
10.30 Football - World Cup Legends France
11.30 Football - Gillette Dream Team
12.00 Football - Gillette Dream Team
12.30 Formula 1 - Inside Formula
13.00 Tennis - Grand Slam Tournament French Open - Live
18.00 LG Super Racing Weekend™ - LG Super Racing Weekend™ Magazine
18.30 Motorsports - Series
19.00 Boxing - To Be Announced
20.00 Tennis - Grand Slam Tournament French Open
21.00 Football - Inside The Teams
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Football - World Cup Classics
23.30 Football - Asian Culture Cup
23.45 Football - Inside The Teams
0.45 News - Eurosportnews Report
1.00 Football - Asian Culture Cup

### BBC Prime

0.20 TLZ: »Journeys to the Bottom of the Sea – Priceless Cargo«
1.10 TLZ: »Century In Motion«
1.40 TLZ: »Century In Motion«
2.10 TLZ: »Forum – the Next Big Thing«
2.40 TLZ: »Sounds – What have the 80´s ever done for us?«
2.50 TLZ: »Talks – Background Brief- the Science of Foot«
3.05 TLZ: »The Cretaceous Greenhouse – a Surfeit of Carbon Dioxide«
3.30 TLZ: »The Challenge - Fastest Round the World«
4.00 TLZ: »Blood on the Carpet – Guns 'N' Posies«
4.40 TLZ: »Science in Action – Friction«
5.00 TLZ: »Susanne«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 Smarteenies
6.15 Bits & Bobs: »Cleaning«
6.30 Yoho Ahoy: »Chairs«
6.35 Toucan Tecs: »The Big Drip«
6.45 Playdays: »Dot Stop«
7.05 Bright Sparks
7.30 Celebrity Ready Steady Cook
8.15 Real Rooms: »Rugley Motorhome«
8.45 Going for a Song
9.15 Battersea Dogs Home
9.45 Vets in Practice: »Brothers in Arms«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Silver Nemesis«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »A Pocketful of Rye« - Part One
13.30 Celebrity Ready Steady Cook
14.15 Smarteenies
14.30 Bits & Bobs: »Cleaning«
14.45 Toucan Tecs: »The Big Drip«
14.55 Playdays: »Dot Stop«
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »Spring Fever«
16.45 Ainsley's big Cook out: »Mexico«
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 2 Point 4 Children: »Fortuosity«
20.00 The Sculptress
21.00 Bottom: »S Up«
21.30 Britannia
22.30 Testing Times
23.20 Casualty: »You Can't Take Them All Home«

### BBC World

0.00 BBC News - followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News - followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News - followed by Weather
2.30 Africa Direct (r)
3.00 BBC News - followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News - followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News - followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News - followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News - followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News - followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News - followed by Weather
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News - followed by Weather
10.30 Africa Direct (r)
11.00 BBC News - followed by Weather
11.30 Asia Today
11.45 Sport Today
12.00 BBC News - followed by Weather
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News - followed by Weather
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News - followed by Weather
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News - followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News - followed by Weather
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report - followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News - followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News - followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News - followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News - followed by Weather
22.30 Panorama
23.00 BBC News - followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

### TV 3

4.50 Garfield og venner
5.15 Børnehjørnet
7.00 TV-Shop
8.50 Lassie på nye eventyr
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen
11.00 Horton-sagaen
11.55 Once & Again
12.50 Family Law
13.50 En ny chance
15.35 Blossom
16.05 Ricki Lake
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Sjov og Spas
18.30 Alle tiders barnepige
19.00 Skadestuen
20.00 Den lille og den store
21.00 Line Baun Danielsen møder Mike Tyson
21.30 Lewis vs Tyson - optakt
21.35 Jack the Ripper
23.35 Seinfeld
0.05 Ti tommelfingre
0.35 Walker, Texas Ranger
1.25 Nash Bridges
2.25 Træneren
2.55 Træneren
3.25 Sunset Beach
4.10 Herkules - de unge år
4.35 Godnat

### ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Marjun Bæk, prestur, lesur
7.15 Barnaløtan
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Marjun Bæk, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm leggur til rættis
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg skipar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Victor Carlsen stílar fyri
18.00 Barnaløtan (e)
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 HM í fótbólti
19.00 Tilvera: Eri eg ein curling mamma? - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Heimadoktarin - Einar Joensen lesur stuttsøgu eftir Martin Joensen
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

### Rás 2

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Annika B. Mortensen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Annika B. Mortensen leggja til rættis
16.00 Tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jeremias profetur (8·12) - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

### Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti
2.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast

## Tilvera: Eri eg ein curling mamma?

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Curling mamma og curling pápi eru nýggj hugtøk. Hesi heiti verða sett á foreldur, sum kveistra burtur allar forðingar á vegnum hjá barninum, so alvin kemur snikkaleysur á mál. Men hvussu verður tað ættarliðið skikkað, sum vit tá fáa? Eitt barn, sum ongantíð kemur til eina forðing ella noyðist at slaka, verður eitt sjálvsøkið barn, ikki vísir øðrum atlit. Gestur í sendingini er Anna V. Ellingsgaard, sum sigur frá hesum.

## Krimitímin: Undir illgruna III 2:2

**SVF Hóskvøldið kl. 21.55**

Jane Tennison jagstrar tann, sum hevur myrt trekkjaradreingin Connie og hon hevur samstundis fingið frænir av einum pedofilringi. Meðan vitni koma kropp á kropp við avdúkandi upplýsingum um Parker-Jones, sum hevur ein depil fyri gøtubørn, torir ongin at vitna móti alfonsinum James Jackson, sum er undir illgruna fyri morð. Samstundis arbeiða yvirmenninir hjá Jane púra opið móti henni, teir tykjast at fjala út yvir onkran. Men hvønn og hví?

## Skadestuen

Abby vaknar upp heima hjá Luka, og Carter uppdagar, at Susan hevur sovið hjá Mark. Tá ein kvinnuligur sadomasochistur verður koyrdi á skaðastovuna, gloymir hon, til stóra gleði fyri Abby, Carter, Luka, Susan og Gallant, sína leikutoystasku. Weaver fangar tey, meðan tey leita í taskuni, og ger av at senda tey á eitt sex-chikane skeið. Her læra tey øll eitt sindur meira um hvønn annan…



**TV 3 Hóskvøldið kl. 19.00**

## ÚF Morgunlestrar

**3.–8. juni**

***Marjun Bæk, prestur, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 3. juni:**
nr. 36 Himlafaðir, gløgt tú kennir
Sálm. 139,1–3

**Týsdagin 4. juni:**
nr. 40 Hvør kann Harrans stórverk fata
Sálm. 139,4–6

**Mikudagin 5. juni:**
nr. 57 Mær halda Harrans hendur
Sálm. 139,7–10

**Hósdagin 6. juni:**
nr. 34 Hvørt eitt ljós á lívsins nátt
Sálm. 139,11 & 12

**Fríggjadagin 7. juni:**
nr. 37 Hvar Guð vil, glaður fari eg
Sálm. 139,13–16

**Leygardagin 8. juni:**
nr. 28 Guð, tú ið tendraði mána og sól
Sálm. 139,17 & 18



Týskland, Saudi Arabia, Írland og Cameroon:

# Týskararnir vinna altíð

**Omanfyrstandandi yvirskrift er kanska ikki heilt so sonn longur, men lítið er tó at ivast í, at týskararnir í øllum førum koma víðari úr innleiðandi bólkinum**

**BÓLKUR E**
*Jákup Mørk:*

Gary Lineker tók einaferð til, at fótbóltur er eitt spæl har 22 mans dystast móti hvørjum øðrum, og har týskararnir altíð vinna.

Hesi orðini skuldu gerast heimsgitin, men spakuliga er hetta kortini vorðin ein sannleiki við ávísum dagføringum.

Tað er framvegis eingin ivi um, at Týskland uppalir nakrar av treystastu leikarunum í heiminum, men úrslitini síðani EM-sigurin í '96 hava tó ikki altíð verið teimum til vildar.

Umframt at liðið hevur havt trupult við at liva upp til siðvunnu vónirnar, sum altíð verða settar, so hevur HM-útgávan av týska liðnum eisini tann trupulleika, at fleiri týdningarmiklir leikarar eru skaddir. Sostatt eru Jens Novotny, Christan Wörns, Sebastian Deisler og Mehmet Scholl úti, longu áðrenn HM byrjar. Venjarin og fyrrverandi stórspælarin, Rudi Völler, er tó ikki í iva um, at stríðsandin hjá liðnum fer at sigra á hesum.

Ivaleyst er tað eisini rætt, at stríðsandin fær liðið heilskapað úr bólkaspælinum, men nakað gullmerki verður talan neyvan um.



*Týskarar tykjast ikki hava somu styrki í dag, sum teir høvdu fyri fáum árum síðani, men venjarin, Rudi Völler, hevur tó fult álit á, at gamlar kempur sum Bierhoff og Kahn hava dygdirnar, sum krevjast, fyri at teir aftur skulu gera seg galdandi*

*Mynd: Reuters*

### Silvurstríðið

Plássið við síðuna av Týsklandi fara Írland og Cameroon helst at stríðast um. Írar hava seinnu tíggju árini ella so verið ein sera treystir partur av fótbóltssøguni. Kanska er spæl teirra ikki altíð so vakurt, men teir stríðast ein fyri allar og allir fyri ein, og saman við góðari ættargranskan hevur hetta ført liðið til nógv endaspøl hesa tíðina.

Tað tykist tó sum um hesin musketer-andin nú er um at hvørva av liðnum. Í hvussu so er hevur trætan millum venjaran, Mick McCarthy, og absoluttu stjørnuna á liðnum, Roy Keane, ikki styrkt um ímyndina av hesum, og at Keane er farin heim aftur til bretsku oyggjarnar, er í øllum førum ein stórur missur fyri liðið. Júst hvussu stórur má tíðin vísa.

Heima verður landsliðið hjá Cameroon aloftast rópt fyri leyvurnar. Eitt navn, sum gevur eina ímynd av einum ógvusligum rovdjóri, sum skræðir mótstøðuna í petti. Tíðum hevur landsliðið tó havt trupulleikar av at liva upp til navnið, men nú tykist daga. Landið vann OL-kappingina í Sydney, og kom uttan stórvegis trupulleikar til HM, men størsti vansin eru helst fyrireikingarnar – ella mangul upp sama.

Ruðuleiki hevur valda at kalla síðani OL-gullið. Venjarin er skiftur tríggjar ferðirnar, og trætur um bonus pengar og annað hava neyvan bøtt um samstarvsstevið, sum er so týdningarmikið í slíkari kapping. Megnar Cameroon at vinna á hesum, fer liðið uttan iva at gera um seg í summar, men hetta kann eisini verða júst tað, sum ger av við leyvurnar longu í bólkaspælinum.

### Ov tungt

Seinasta liðið í bólkinum er Saudi-Arabia, og eins og áður, fáa teir sera trupult við at vinna seg víðari úr bólkaspælinum.

Tað gjørdi landið fyrstu ferðina, teir tóku lut við HM. Millum annað við ógloymandi málinum hjá Al Ouaryan móti Belgia, men fyri fýra árum síðani í Fraklandi gekk verri, og eftir øllum at døma fara teir heldur ikki at røkka víðari hesaferð. Ikki tí at talan er um nakað vánaligt lið, men heldur tí mótstøðan frá hinum trimum londunum tykist ov sterk.

**Dystirnir:**

| | |
|---|---|
| 01.06 | Írland-Cameroon |
| 01.06 | Týskland-Saudi Arabia |
| 05.06 | Týskland-Írland |
| 06.06 | Cameroon-Saudi Arabia |
| 11.06 | Cameroon-Týskland |
| 11.06 | Saudi Arabia-Írland |

Suður Korea, Póland, USA og Portugal:

# Europa stendur sterkt

**Tað líkist eini europeiskari yvirvág í bólki D, har Póland og Portugal eru favorittarnir, tó at vertstjóðin og USA kunnu arga**

**BÓLKUR D**
*Jákup Mørk*

Tær sekstan ferðirnar dystast hevur verið um HM í fótbólti, er tað enn ikki komið fyri, at vertstjóðin ikki hevur vunnið seg víðari úr innleiðandi umfarinum.

Í Suður Korea ætla tey sær ikki at gerast tey fyrstu at mótprógva hagtølunum, men hóast góða seeding til lutakastið, so bendir nógv á, at tað kann gerast trupult at halda fast við góðu hagtølini.

Við hollendska Guus Hiddink á beinkinum, skuldi hesin parturin av liðnum verið í lagi, men hann sleppur so ikki at spæla sjálvur. Tað skulu leikararnir sjálvir gera, og hóast talan fyri landið er um fimta endaspælið á rað, so hava úrslitini sjáldan verið nakað at reypa av. Og tað verður torført at bøta tey somikið, at talan gerst um víðari luttøku í kappingini.

### P&P sýna styrki

Tað eru nevnliga tvey rættiliga sterk europeisk lið, sum eru í bólki saman við øðrum av vertstjóðunum.

Poland hevði í sjeyti- og fyrst í áttatiárunum eitt av sterkastu fótbóltsliðunum í heiminum. Áleyparar sum Boniek og Lato taldist millum stóru stjørnurnar, og tvey bronsumerki í HM-høpi siga eisini nakað um styrkina, sum liðið hevði tá.

Síðani hevur gingist heldur striltið, men nú tykist aftur at gerast ljósari. Við Emmanuel Olisadabe, sum upprunaliga er úr Nigeria, hevur liðið aftur fingið ein veruligan málslúk, og yvir høvur tykist talan vera um sterkan bul á liðnum.

Portugal var leingi landið, sum fólk bíðaðu eftir fór at fáa sítt veruliga gjøgnumbrot. Eftir Eusebio-tíðina í '66 og viðfáningin undir EM í '84 var leingi hampuliga kvirt, tá talan var um fótbólt á altjóða pallinum.

Seinna partin av 80'unum átti landið tó í fleiri ár nøkur av bestu U-landsliðunum í heiminum, og nú tykist leikararnir frá hesum veruliga at vera búnaðir, soleiðis at teir eisini teljast millum teir bestu í vaksnu røðunum. Eisini hóast hetta er fyrsta ferðin, at hesir leikararnir eru partur av HM-endaspælinum.

Luis Figo, Rui Costa, Paolo Sousa og Joao Pinto taldust allir millum leikararnar á ungdómsliðunum, sum vunnu fleiri heiti, og í dag eru hesir berandi kreftir hjá ættarliðnum, sum helst spælir sítt seinasta HM hesaferð.

Ikki minst hjá Figo, sum telist millum heimsins bestu leikarar, man týdningurin av HM tí kennast stórur, og hóast árið í ár ikki hevur verið hansara besta hjá Real Madrid, so er lítið at ivast í, at hann og liðfelagarnir vilja geva nógv, fyri at teir kunnu teljast millum heimsins bestu fótbóltstjóðir.

### Lítla stórveldið

Stórveldið, USA, er á fjórða sinni á rað partur av endaspælinum, men hóast nógva marknaðarføring og eitt HM á heimabeiti, so hevur hetta slagið av fótbólti enn ikki fingið fastatøkur í samveldisríkinum.

Umstøðurnar at gera seg galdandi hesa ferð tykjast heldur ikki bjartari enn vanligt. Tó at einstakir spennandi leikarar eru í hópinum, so tykist tað framvegis so, at tá talan er um fótbólt, so er USA einki stórveldi. Heldur tvørtur ímóti.

**Dystirnir:**

| | |
|---|---|
| 04.06 | Suður Korea-Póland |
| 05.06 | USA-Portugal |
| 10.06 | Suður Korea-USA |
| 10.06 | Portugal-Póland |
| 14.06 | Póland-USA |
| 14.06 | Suður Korea - Portugal |